

*Aki Johansen fyrilestur á ráðstevnu*


*Vitjan á Central Marine Fisheries Research Instititute*


*Ráðstevna um føroyska fiskivinnu í Cochin*


*Løgmaður og Domimic Presentation, ráðharri fyri fiskivinnu í Kerala-landslutinum*


*Rói Egholm, fyrilesur á ráðstevnu*

# Føroyar í fokus í Cochin

**Hósdagin varð skipað fyri fiskivinnuráðstevnu í Cochin, har fólk frá fiskivinnuni í indiska landslutinum Kerala luttóku saman við føroysku sendinevndini, sum í løtuni er við løgmanni á handilsferð í India. Ráðstevnan varð skipað í samstarvi við The Seafood Exporters Association of India – meginfelag hjá indiskum fiskaútflytarum.**

Á ráðstevnuni vóru framløgur um Føroyar sum fiskivinnutjóð, um fiskiskap í norðuratlantshavi, um føroyska fiskiídnaðin, um globaliseraða fiskiídnaðin og hvørjir møguleikar eru fyri samstarvi. Fokus varð sett á møguleikar at samstarva millum Føroyar sum fiskivinnutjóð og India sum eitt land í stórari menning, og sum ynskir at menna sín fiskivinnuídna.

### Tøkni og rávøra

Indarar hava stóran áhuga í fiskivinnutøkni – serstakliga tøkni til botnfiskiskap og matvøruframleiðslu. Eisini er áhugin fyri eitt nú samvinnu um rávøru – bæði til matna og til fóðurframleiðslu til alivinnuna. Møguleikarnar eru eisini at innflyta vørur – eitt nú fisk – til India fyri at virðisøkja fiskin, og so selja hann víðari til annað land. Eingin tollur er á sonevndari “import til export-vøru”.

### Laksur

Ein forðing fyri at innflyta vørur á indiska marknaðin er høgur tollur á nógvum innflutningsvørum. Men hesar forðingar verða stigvíst fyribeindar. Eitt nú lækkaðu indusku myndugleikarnir tollin á innflutningi av aldum laski úr 30 % niður í 10 % fyrr í vikuni, tá stjórnin legði fram fíggjarlóg. Áhugi er fyri at keypa aldan laks úr Føroyum og øðrum londum er stórur, tí eftirspurningurin eftir laksi veksur skjótt, serstakliga í býunum.

### Føroyar í fokus

Í Cochin hava løgmaður og sendinevndin vitjað eina røð av indiskum fyritøkum og stovnum – CAP Seafood, Central Marine Research Institute, Sealab, Amalgam Food & Beverages Industries og The Marine Products Export Development Authority (MPEDA).

Allastaðni hevur verið gjørt nógv burturúr vitjanini. Fjølmiðlarinir hava eisini víst stóran áhuga, og fleiri bløð og sjónvarpsrásir hava borið tíðindir um vitjanina.

– Tit kundu ikki havt valt eitt betri høvi at vitja India enn beint í løtuni. MPEDA og felagið hjá fiskaútflytarunum royna av øllum alvi at finna vegir til millumtjóða samstarv innan fiskiframleiðslu, aling, botnfiskiskap við meira. Eingin ivi kann vera um, at bæði India og Føroyar kundu fingið nógv burturúr einum samstarvi, segði formaðurin fyri MPEDA, M. Mohan Kumar.

– Útlendskir íleggjarar eru sera vælkomnir í India, og tí ynskja vit, at føroyskar fyritøkur hyggja hendanvegin. Tit hava tøkni og rávørur við høgari góðsku. 85% av okkara útflutningi er blokkur, og vit hava sera stóran áhuga í at virðisøkja fiskin. Tað eiga at vera nógvir møguleikar fyri samstarvi, segði A.J. Tharakan, presidentur í The Seafood Exporters Association of India, tá ráðstevnan í Cochin endaði hóskvøldið.

Allastaðni hevur verið gjørt nógv burturúr vitjanini. Fjølmiðlarinir hava eisini víst stóran áhuga, og fleiri bløð og sjónvarpsrásir hava borið tíðindir um vitjanina.

## Løgmaður fund við ráðharra í fiskivinnumálum

Løgmaður hevur hitt Dominic Presentation, ráðharra í fiskivinnumálum í indiska landslutinum Kerala til óformligan fund hósdagin. Dominic Presentation og Jóannes Eidesgaard hittust í sambandi við fiskivinnuráðstevnuna, ið varð hildin í býnum Cochin, sum er fiskivinnumiddepilin í India.

– Hóast Føroyar er eitt lítið land, so er tað tøkniliga sera framkomið innan fiskivinnu. Eg vóni veruliga at okkara vinnulívsfólk, sum luttaka á ráðstevnuni í dag saman við tykkara vinnulívsfólkum, kunnu ganga saman í samstarv til felags gagn fyri báðar partar. Her eru jú nógvir møguleikar, segði Dominic Presentation.

Løgmaður legði dent á hvussu áhugaverd búskaparliga menningin í India er fyri føroyingar. Hann fegnaðist um tey vinnuligu sambond, sum verða knýtt á hesi ferðini, og segði seg ikki ivast í, at møguleikarnir eru sera nógvir at samstarva í framtíðini.

Føroyar vilja, eins og okkara grannalond, eisini troyta hesar spennandi møguleikar, segði løgmaður.